**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*





*- Tað skal vera eitt millumting millum vanligu pubbirnar/barrirnar og Norðurlandahúsið. Tað skal ikki vera for stórt og flott, men heldur ikki ov lítið og bulut, sigur Heðin Ziska Davidsen, tónleikari*

øllum førum eitt stig á vegnum. Onkuntíð má mann siga takk fyri tað, sum mann fær, og gera tað besta burturúr tí, so tað kann nøkta so stóran tørv sum gjørligt. Og eg haldi, tað er týdningarmikið, at mann tekur av nú, tí um mann sigur nei til hetta, so fara tað bara at ganga fimm ár afturat, áðrenn nakað annað kemur í ljós, greiðir Beinta frá.

**Týdningarmikið at lurta eftir tónleikarunum**

- Eg haldi, at tað skal vera eitt stað, har øll eru vælkomin. Har sum tónleikurin er í hásæti. Har mann kann fara inn at drekka ein kaffimunn og práta, óansæð hvat klokkan er, sigur Beinta víðari.

- Tað hevur alstóran týdning, at kommunan lurtar eftir tónleikarunum, tí tað eru teir, ið vita, hvør tørvurin er. Kommunan er tí noydd til at seta ein leiðara, sum bæði kann halda skil á, og sum kann virka sum talirør millum ynskini hjá kommununi og hjá tónleikarunum. Og verður tað gjørt rætt, kann tónleikarin fáa fantastiska gott pláss har.

- Ein møguleiki er at umsita tað líka sum Ungdómshúsið í Keypmannahavn ger. Har verður tað gjørt soleiðis, at tónleikararnir sjálvir leiga seg inn á staðið at hava konsertir, tá teir vilja. Húsið kann altíð lænast ókeypis, og har fylgir anlegg við, men tónleikararnir skulu sjálvir syrgja fyri at gera klárt og fyri at promovera tiltakið hjá sær; at fáa fólk at møta upp til konsertirnar.

Tónleikararnir fáa so yvirskotið av inngongdini, so har kann vera nakað av vinningi, um teir leggja arbeiði í tað.

- At fyriskipa tað sjálvur, kann vera ótrúliga motiverandi, og teir kunnu læra, hvat tað krevur at stápla konsertir upp. Tað kostar bara kommununi ein dagligan leiðara, ein teknikkara og so at innstallera eitt annlegg. Á hendan hátt sleppur tú fram at, óansæð hvør tú ert. Tað er eingin, sum skal vurdera, hvør er góður nokk, og tað kann eisini geva góða variatión í tónleikasløgini, ið vera at hoyra.

**Ikki til rokktónleikin**

Fríði Bjørgvin, ið er oddamaður í trashmetal bólkinum Ineptus, heldur ikki, at Gamla Reinsarí er nóg væl innrættað til allar tónleikastílar, og kundi hugsað sær, at nakrar broytingar vórðu gjørdar í hølinum.

- Eg haldi, at Gamla Reinsarí, sum tað er, er feitt til tann tónleikin, sum vit hoyrdu hin dagin. Til jamsessions, fólkatónleik, jazz osfr, men loftið er alt ov lágt til rokktónleik. Tað er øgiliga keðiligt, tí eg spæli sjálvur rokktónleik.

- Tað, sum skuldi til, fyri at staðið eisini bleiv til tann harða tónleikin, var, at mann tók aðru hædd vekk ella bara helvtina av tí og gjørdi eina balkong í eina endanum. Tað hevði verið pissifeitt. Tí at so hevði tað kunnað verið brúkt til allar tónleikastílar, og so hevði tað eisini sæð feitt út.

- Um mann skal gera eitt spælistað, kann mann akkurát tað sama gera tað til allar stílar, og eg haldi, at kommunan burdi umhugsað tað. Eg ivist bara stórliga í, at tey ganga við til tað.

- Staðið, sum tað er, er eisini kul. Tað er eitt stig tann rætta vegin, men um tað hevði verið broytt, hevði tað verið enn feitari. Tí tað eru annars bara tvey støð her í Havnini, har bólkar sum Ineptus kunnu spæla; Norðurlandahúsið og Sjónleikarhúsið. Í NLH er eingin kjansur at spæla vanligar konsertir, og Sjónleikarhúsið er altíð upptikið. Afturat teimum báðum er bara Mentanarhúsið í Fuglafirði, og tað er pissiirriterandi at skula koyra allan vegin norður har, hvørja ferð ein vil spæla konsert.

- Eg mæli við, at kommunan ger hasa lutvíst lítlu broytingina, soleiðis at tað verður pláss fyri øllum tónleikastílum.



*- Eg haldi, at Gamla Reinsarí, sum tað er, er feitt til t.d jamsessions, fólkatónleik, jazz osfr, men loftið er alt ov lágt til rokktónleik. Tað er øgiliga keðiligt, tí eg spæli sjálvur rokktónleik, sigur Fríði Bjørgvin, forsangari í metalbólkinum Ineptus*

**Har tú kemur fyri tónleikin**

Heðin Ziska Davidsen, tónleikari, hevur verið við í almenna kjakinum um spælistað í Havnini í mong ár.

- Nú hava vit tosað um hetta spælistaðið í út við fimm ár. Niðurstøðan hjá mær er, at tað skal vera eitt millumting millum vanligu pubbirnar/barrirnar og Norðurlandahúsið. Tað skal ikki vera for stórt og flott, men heldur ikki ov lítið og bulut, sigur Heðin.

- Eitt sovorðið stað hevði gjørt, at ein sjálvur fór til fleiri konsertir; at ein var meira úti um seg. Sum er, eru nøkur støð, har mann kann spæla, men tað er eitt sindur troyttandi at fara við nøkrum, tú hevur brúkt ein stóran part av tínum lívi uppá at skapa, og næstan bara spæla fyri drukkenboltum. Ikki tí, at tað bara eru drukkenboltar, sum eru á støðunum, men teir eru í hvussu er so nógvir í tali, at teir stjala myndina av áhoyrarunum. Nýggja spælistaðið skuldi verið eitt stað, sum meldaði klárt og greitt út, at tað er fyri tónleikin, og at tú also kemur har fyri tónleikin. Tí at akkurát tað finst ikki enn. Jú, í Margarinfabrikkini koma fólk fyri tónleikin, men tað fungerar bara til eitt vist, tí tað staðið hevur eitt øgiliga ungdómsligt klientell, og ikki allir aldursbólkar kunnu umboðast har.

- Eg hevði viljað sæð eitt stað, har mann uppá tvær vikur hevði kunnað verið á konsert hjá t.d Sic, Aldubáruni, Budam, og Jack Schidt, fyri at nevna nøkur dømi. Eitt stað, har tú kemur fyri tónleikin, og har sum allar sjangrur – t.d. klassiskt, jazz, folk, rokkur og poppur kunnu umboðast síð um síð. Tað haldi eg hevði verið sunt fyri allar partar, greiðir Heðin avgjørdur frá.

**Hvat fer at henda við Gamla Reinsaríið, kemur í ljós komandi vikurnar, og vit fylgja við so hvørt sum fleiri tíðindi vera at frætta frá øllum viðkomandi frontunum**